tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Gransking og umsitingin

## *Oddagrein*

Tað er týdningarmikið, at tað tilfeingi, ið er her á hesum landi verður nýtt á bestan hátt, herundir eisini menniskjaligt tilfeingi og vitan. Sera áhugavert var at lurta eftir einum av okkara búskaparfrøðingum í sjónvarpssendingini Innskot fyrrakvøldið. Hesin hevði á orði, at ov lítið varð granskað í umsitingini. Hann sipaði millum annað til føroyska tjóðarroknskapin ella mangul uppá sama.

Vit hava her á hesum stað nevnt, at landið átti at staðið á odda fyri at skapt eitt mennandi arbeiðsumhvørvi fyri vælútbúgvið fólk. Tá so eitt av hesum fólkum finst at umsitingini fyri at granska ov lítið í eitt nú føroyska tjóðarroknskapinum, so má hettar metast sum eitt álvarsmál, ið vónandi verður hugt at í umsitingini. At tað verður granskað ov lítið í tjóðarbúskapi er so eitt, men tað merkir ikki, at als eingin gransking gongur fyri seg í Føroyum.

Fróðskaparsetrið er tíbetur eitt aktiv, hvat gransking viðvíkur. Har verður granskað í náttúruvísund søgu o.s.fr. Spurningurin er bert, um landsumsitingin við teimum ymsu stýrunum veit av, hvat gongur fyri seg.

Vinnumálastýrið sendi herfyri fólk til Svøríkis at hyggja at kunningartøkni, uttan yvirhøvur at spyrja, hvat Fróðskaprsetrið visti um evnið. Nú hevur Vinnumálastýrið ikki júst verið tað stýrið, ið hevur skarað mest framúr við hepnum handalag, men eitt minsta krav má verða, at menn seta seg inn í tað, teir gera. Tað ber illa til, at hjólið og tann djúpi tallerkurin verða enduruppfunnin ferð aftaná ferð, tí umsitingin heldur, at einki er gjørt av nøkrum uttan fyri stýrisbøgarðarnar. Slíkt hevur Føroya land snøgt sagt ikki ráð til.

Vónandi ber til at endurskoða Finn Norman Christensen bygnaðin, so brýr verða bygdar millum ymsu stýrini. Høgra hond má vita hvat vinstra ger. Um stýrini ganga hvør í sínum lag og halda seg verða pionerar, so er vandi fyri at ganga í ring og skapa dupultfunktiónir.

Vit hava her á hesum stað leingi eftirlýst einum kjak um Norman Christensen bygnaðin og avleiðingarnar av honum. Spurningurin er, um tað er eitt úrslit av bygnaðinum, at Vinnumálastýrið ikki veit, hvat gongur fyri seg í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum ella um feilurin kemst av, at umsitingin ikki granskar í tí, hon átti at granskað í, heldur enn eitt nú náttúruvísind. Føroyingar hava tíbetur eitt Fróðskaparsetur, og harmiligt hevði verið, um miðfyristingin ikki gekk á odda í at gera brúk av hesum, heldur enn at royna at byrja fyri seg sjálvan frá fyrstu síðu av.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Fullveldi er at gerast myndugur - og tá kunnu vit gera ein veruligan felagsskap

Samráðingarnar við danir um fullveldisætlanina byrja fyrsta dagin, og ræðusøgurnar ganga nú á øðrum ári. Millum annað hoyri eg nógv ungfólk siga: Nei, eg vil ikki hava fullveldi, tí so missi eg nøkur rættindi til at lesa og ferðast í øðrum londum. Onnur siga: Nei, eg vil ikki hava fullveldi, tí so fara vit úr ríkisfelagsskapinum og so lækkar livistøðið.

At hetta hevir verið jabbað uppaftur og uppaftur av summum politikarum, ger tað als ikki til nakran sannleika. Tað ber væl til at tryggja rættindi hjá ungdóminum at lesa bæði í Danmark og aðrastaðni, væl betri enn vit hava í dag. Og tað ber væl til at hava ein nógv betri felagsskap við Danmark enn vit hava í dag - uttan at tað elvir til nakran skelk í búskapinum.

**Í dag liggur evsta ábyrgdin í Danmark**
Fullveldi fyri lond merkir tað sama sum *at vera myndugur* sum persónur. At tú hevur rætt til at gera alt av sjálv/ur og má taka fulla ábyrgd fyri tínum gerðum og avtalum við onnur.

Eg havi ongantíð hoyrt um nakran felagsskap, sum ikki er gjørdur millum myndugar persónar. Tí er orðið ríkisfelagsskapur eitt púra skeivt orð at brúka um støðuna hjá okkum í dag — og hetta tykist endiliga at koma fram í almenningin. Danmark er eitt eindarríki og kann til eina og hvørja tíð taka avgerðir um okkara framtíð og vit kunnu missa rættindir. Tað var júst tað sum hendi í 1992.
Í dag liggur evsta ábyrgdin og valdið yvir Føroyum hjá donsku ríkismyndugleikunum. Tá vit hava fullveldi liggur øll ábyrgd og evsta valdið hjá føroyska fólkinum. Evsta valdið og ábyrgdin kann bara liggja einastaðni — antin hjá okkum ella í Danmark.

Við fullveldi hava vit fulla ábyrgd av okkum sjálvum og teimum avtalum, vit gera við Danmark og onnur lond. Og avtalurnar verða bindandi sambært i altjóða reglum.

**Felagsskapur við ábyrgd**
Við fullveldi gera vit ein sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond — júst sum tá tvey myndug fólk gera eina avtalu. Tá vita vit júst, hvat vit hava, og ongin kann bara broyta tær, soleiðis sum tað hendi í 1992. Tá kunnu vit fyrstani tosa um ein veruligan felagsskap millum brøðratjóðir. Har báðir partar hava somu skyldur og ábyrgd, og ongin er yvir hinum.

Hvussu góða avtalu vit fáa við Danmark veldst um, hvussu væl vit duga at samráðast og hvussu samd vit standa í Føroyum.

**Tað verður trupult - men neyðugt**
Tað verður ikki bara at siga tað, at skapa eitt gott vælferðarsamfelag í Føroyum, og vit vita ikki enn hvussu búskaparliga skiftistíðin sær út. Tað fer at krevja nógv av okkum øllum — ikki minst at vit duga at húsast og býta virðini nógv betri, enn vit gera í dag.

Tað fer at krevja sama samhaldsfesti, sum hevur skapt hetta landið ígjøgnum 40 ættarlið. Inntil vit rendu tað um koll í 80'unum í jagstranini eftir egnum vinningi.

Vit vita, at vit hava ongantíð havt so góðar búskaparligar møguleikar sum nú at gerast sjálvbjargin. Vit brúka nú bert einar 300 milliónir krónur av blokkinum til at reka samfelagið. Tað er ikki meira enn landsstýrið skrivaði út til nýggjar trolarar uppá ein dag í 80'unum.

Um vit aftur fara at brúka av blokkstuðlinum, har



meginparturin í dag verður settur á bók, so rúka vit lúkst á heysin aftur sum í 1992 — tað verður bara ein spurningur um tíð.

**Trygdin liggur í fólkaræðinum**
Trygdin fyri alt Føroya fólk er, at tað verða allir føroyskir veljarar sum skulu gera av, um úrslitið av samráðingunum við donsku stjórnina er nóg gott til, at vit vilja taka tað fullu ábyrgdina av okkum sjálvum, landinum og felagsskapinum við Danmark.

Ongum nýtist tí at ræðast framtíðina. Alt kemur á borðið og øll sleppa at siga ja ella nei. Hesaferð kunnu vit sjálvi avgera okkara framtíð.

**Høgni Hoydal**
**landsstýrismaður**

# Lat Marius Paula fáa stuðulin

Eg rokni við, at ikki so fáir føroyingar gjørdust eitt sindur kløkkir, tá Dagur og Vika nú eitt kvøldið segði, at teir á Royndarstøðini í Kollafirði høvdu avlívað seinasta føroyska tarvin, enntá ein bert tvey ára gamlan tarv. Har stóðu menn og táraðu um, hvussu hjartaleysir politikararnir vóru, men eg má siga, at eg meira beit á kampi yvir, hvussu hjartaleysir hesir á Royndarstøðini vóru.

Vit skiltu øll, at okkurt var gingið gali í umsitingini, og tað skal sigast, at um tað var fyri at fáa umsitingina at gáa eftir, so kundi onnur vápin verið nýtt, enn at drepa »hønuna sum legði gulleggini«. Tápuligheit og uppgerð út um alt mark vil eg kalla tað.

Nú vísir tað seg tíbetur, og Gud havi lov fyri tað, at eitt gløgt høvd í Sandavági bjargaði okkum undan landaskommini. Tí landaskomm kalli eg tað, lata vit hetta meira enn 1000 ára gamla neytaslagið doyggja út, sum vit hava fingið at uppsita, og sum hevur lívbjargað føroyinginum alla okkara



tíð her á landi.

Tí skjóti eg upp, í fullum álvara, og eg vóni, at avvarðandi politikkarar hoyra ella lesa hetta og gera eftir tí, at Marius Pauli, sum tøkk, fær allan tann stuðul, um tað so er hálv millión, ið Royndarstøðin skuldi havt fingið fyri at røkt sína uppgávu. Ein uppgáva teir so dyggiliga missrøktu.

Eg meini, eingin skal siga mær, at eitt stórt fjós ikki hevur ráð at hava eitt kríatúr afturat inni. So dýrt kann tað aldrin vera. Og at skaffa pening til kynsbótararbeiðið kundu teir gjørt á annan hátt, enn at dripið djórið, sum alt hvíldi á. Protest skal valdast! Hatta er so óansvarligt, at tað átti at fingið fylgjur fyri tey, sum varaðu av. Og tá hugsi eg ikki um aðalstýrini. Hinir hava so sanniliga eisini sína ábyrd, og tað var hóast alt teir, sum høvdu djórið í varðveitslu – skamm fái. Hvat kann ikki tað næsta blíva? kunnu vit bivandi spyrja. Og har átti Djóraverndarfelagið eisini at vakna. Tey eru so fitt at verja eygagóð djór sum kettur, hundar, kanariufuglar og kaninir, og alt gott um tað.

Men eru neyt og tarvar ikki eisini djór?

**Sonni Jacobsen**

†

Kunngjørt verður at góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**LEIVUR EJDESGAARD**
Oyndarfirði

andaðist leygarkvøldið 19. februar, 69 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 15.

Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju hósdagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*

**Bodil, Sólgerð, Jústinus, Jón Ingi, Lív, Fróði og Sjúrður**



*Kanning av brunatrygdini á Landssjúkrahúsinum:*

# Brunatrygdin er ov vánalig

*Fyri trimum árum síðani varð gjørd kanning av brunatrygdini á Landssjúkrahúsinum. Hóast trygdin ikki er beinleiðis lág, skulu nógvar ábøtur gerast fyri at bøta um sjúklingatrygdina á Landssjúkrahúsinum. Ov stór rúm og manglandi installatiónir gera, at trygdin á Landssjúkrahúsinum ikki er nóg høg. Kortini er einki av tilmælunum sett í verk*


Mynd: Jens Kristian Vang

*Fyri at hækkað sjúklingatrygdina, eigur hvørt rúmið ikki at vera longri enn 25 metrar, sigur frágreiðingin frá Dansk Brandteknisk Institut. Hóast tað er einki gjørt á landssjúkrahúsinum fyri at stytta um eitt nú hesa gongina*

SVEINUR TRÓNDARSON

Hóast trygdin á Landssjúkrahúsinum ikki er beinleiðis lág, so er hon als ikki nøktandi, og ávísar ábøtur eiga at vera gjørdar, soleiðis at sjúklingatrygdin verður bøtt.

Soleiðis umskrivað er niðurstøðan av eini trý ára gamlari frágreiðing, sum er gjørd av brunatrygdini á Landssjúkrahúsinum.

Kanningin er trý ára gomul, men hóast tað er einki av tilmælunum í frágreiðingini sett í verk.

**Brunatrygdin eftirbátur**
Tað var í 1996, at Brunaumsjón Landsins og leiðslan á Landssjúkrahúsinum í felag valdu at heita á Dansk Brandteknisk Institut at gera eina kanning av brunatrygdini á Landssjúkrahúsinum.

Petur á Lava Olsen, leiðari á Brunaumsjón Landsins, sigur við Sosialin, at tað er teirra uppgáva at kanna brunatrygdina, men í hesum førinum sá hann seg ikki føran fyri at gera kanningina einsamallur, og tí bað landsstýrið danir gera kanningina fyri seg.

Hetta varð gjørt á summri í 1997 og úrslitið var ein frágreiðing, sum ger vart við, at brunatrygdin á Landssjúkrahúsinum als ikki er nøktandi.

Víst verður á, at varð


Mynd: Jens Kristian Vang

sjúkrahúsið bygt í dag, vórðu krøv sett um sprinklaraanlegg, rýmingarvegir, longd á gongdum, neyð- og panikkljós, brandalarmar og um at bygningurin ikki var í ov stórum brandsektiónum.

– Hesi krøv lýkur Landssjúkrahúsið ikki í dag, sigur frágreiðingin, sum kortini staðfestir, at trygdin ikki er beinleiðis lág.

Orsøkin til, at Landssjúkrahúsið ikki lýkur krøvini er, at bygningurin er gamal og samstundis eru krøvini skerpaði við tíðini. Hinvegin hava sitandi leiðslur og politiski myndugleikarnir ikki havt trygdina fremst í huganum, tá ætlanir eru gjørdar fyri húsið.

**Peningurin avgerandi**
Sum vera mann, er ein orsøk til, at trygdarviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum ikki eru komin upp á pláss er, at tað er rættuliga kostnaðarmikið at dagføra trygdina til nútiðarkrøvini.

Hetta ger frágreiðingin eisini vart við, samstundis, sum hon sigur, at summi krøv ikki eru møgulig at lúka.

Her verður serliga víst á sprinklaraanleggið, sum verður alt, alt ov dýrt at seta upp í verandi bygningi.

Men Petur á Lava Olsen heldur, at onnur tiltøk kundu verið sett í verk ístaðin.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað verður sera kostnaðarmikið at leggja sprinklaraskipan í ein gamlan bygning, men har eru aðrir møguleikar, sum, hóast teir ikki eru líka góðir, bøta munandi um sjúklingatrygdina. Ein møguleiki er, at gera rúmini smærri, við at skyldra rúmini sundur, sigur Petur á Lava Olsen og vísir serliga á tær longu geingirnar.

Hann vísir á, at við hesum ber til at avmarkað økið har eldurin festur í, og samstundis at geva sløkkiliðnum ein møguleika at sleppa skjótari fram at eldinum.

*Tað er ikki ráðiligt at hava eina snúðurtrappu, tá tey, sum skulu brúka hana eru illa - ella als ikki - gongd, sigur Dansk Brandteknisk Institut í frágreiðingini um Brunatrygdina á Landssjúkrahúsinum*

Frágreiðingin sigur, at einki rúm eigur at vera longri enn 25 metrar, men á Landssjúkrahúsinum eru sera nógv rúm, nógv longri.

– Sjálvandi vildu vit fegin gjørt hesar broytingarnar og vit hava eisini havt ætlanir um at gera tær, men fíggjarliga hevur tað ikki verið møguligt, siga Jógvan Elias Thomassen, virkandi sjúkrahúsleiðari, og Suni Rasmussen, leiðari á teknisku deild. Hann var við til at gera frágreiðingina í 1997.

**Raðfesting neyðug**
Frágreiðingin frá Dansk Brandteknisk Institut staðfestir, at tað kann gerast rættuliga kostnaðarmikið, at gera alt í einum. Tí hevur kanningarleiðarin gjørt eina raðfesting av trygdarkrøvunum, soleiðis at tað í fyrsta umfarið verður bøtt um sjúklingatrygdina.

Her verður lagt upp til, at longu rúmini verða býtt sundur í smærri rúm. Hetta skal forða roykinum at sleppa ov langt.

Hereftir vil kanningarleiðarin hava, at tunnilin undir sjúkrahúsinum verður skildur frá bygningunum við brandhurðum.

Eisini heldur hann, at sjúkrahúsið eigur at installerað sjálvirkandi brandávaringarskipanir í teimum bygningum har sjúklingar halda til.

Øll hesi trý punktini bøta munandi um sjúlingatrygdina verður sagt í frágreiðingini.

**Nýggjar brandtrappur**
Kanningarleiðarin hevur bitið merkið í, at tað finst ein snúðurtrappa uttan á tí eina bygninginum.

– Henda trappa er uttan iva sett upp fyri at bøta um rýmingarmøguleikarnar og fyri at geva sløkkiliðnum betri atgongd til bygningin. Tí er tað merkisvert, at trappan er ein snúðurtrappa. Tað er vert at hava í huga, at nógvir sjúklingar, sum skulu brúka trappuna, eru illa gongdir og tí er tað sera løgið, at ein snúðurtrappa er vald fram um eina beina trappu.

Til tað hevur Jógvan Elias Thomassen tað viðmerking, at trappan varð góðkend tá hon kom, men at hetta vísir, hvussu trygdarkrøvini javnan broytist.

**Tilbúgvingarætlan krevst**
Í frágreiðingini verður eisini funnist at, at eingin tilbúgvingarætlan finst fyri Landssjúkrahúsið.

Mælt verður til, at gjørd verður ein ætlan, sum tekur bæði innanhýsis tilbúgving og uttanhýsis tilbúgving við. Ein slík ætlan skal tryggja, at øll starvsfólkini vita hvør teirra uppgáva er, um so er, at eldur kemur í

Hóast tað eru trý ár, síðani kanningin varð gjørd, er einki gjørt við tilbúgvingina heldur.

– Vit hava havt nógv fólk á skeiði og hava eina roynd um árið saman við sløkkiliðnum, men tilbúgvingarætlanin væntar enn. Men tað fara vit undir nú, siga Jógvan Elias Thomassen og Suni Rasmussen.

*Lesið eisini á síðu 9*

